Eik

# Nýhugsandi samskipari

Menningardeild okkara sóknast eftir projekt-samskipara við strategiskum KT- førleika



**Starvið**
Projektsamskiparin gerst partur av eini spennandi fyritøku við hugsjónum og málum innan prosess- og produktmenning.

**Førleiki**
Vit ímynda okkum ein virknan og nýhugsandi samskipara, ið arbeiðir sjálvstøðugt við fleiri og ymiskum verkætlanum, har fíggjarvirksemi er snúðiningsásurin. Evnini at samstarva, arbeiða skjótt við nýggjum hugskotum og at eggja øðrum til eru týðandi, og leiðin frá góðum hugskotum til veruleika má vera stutt.

**Freist**
Skrivlig umsókn skal verða Eik í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 5. november 2007.

**Send umsóknina til:**
Eik Banki P/F
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

**Les meira um starvið á**
www.eik.fo

Kappingarráðið

# Fulltrúar til skrivstovuna hjá Kappingarráðnum

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum søkir við hesum eftir tveimum fulltrúum. Vit kundu hugsað okkum, at røttu umsøkjarar hava útbúgving innan løgfrøði og búskaparfrøði ella hava aðra samfelagsfrøðiliga útbúgving. Einhvør við útbúgving frá hægri læristovni er annars vælkomin at søkja størvini.

Uppgávan hjá Kappingarráðnum er at umsita løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997 um kapping og frá 1. januar 2008 nýggju kappingarlógina, løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007. Lógin hevur til endamáls, við virknari kapping, at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar.

Við nýggju kappingarlógini fær føroyskt vinnulív somu karmar sum vinnan í grannalondunum. Hetta merkir, at fyrsta uppgávan hjá nýggju fulltrúunum verður at fyrireika vinnuna til hesar stóru broytingar.

Kappingarráðið er fyrisitingarliga skipað saman við Skráseting Føroya, Post- & Fjarskiftiseftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

## Størvini

Innihaldið í størvunum fevnir í høvuðsheitum um:
- at fyrireika mál til Kappingarráðið
- at gera kanningar um kappingarviðurskifti
- at menna eftirlitsvirksemi
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir
- at menna førleikarnar á kappingarlógarøkinum

Líknandi uppgávur kunnu eisini verða at loysa fyri Skráseting Føroya, Post- & Fjarskiftiseftirlitið og Tryggingareftirlitið

## Førleikar

Vit vænta, at tú hevur:
- viðkomandi samfelagsvísindaliga útbúgving frá hægri lærustovni ella aðra útbúgving frá hægri lærustovni.
- góð analýtisk evni
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting

Umsøkjarar skulu vera førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og hegni at arbeiða undir trýsti.

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum bjóðar eitt sera fjøltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum, sum eru persónliga og yrkisliga mennandi, umframt møguleika fyri samstarvi og samskifti við norðurlendskar kappingarmyndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum. Vit kunnu bjóða góðar skeiðs- og eftirútbúgvingarmøguleikar, og luttøku á norðurlendskum og altjóða ráðstevnum innan kappingarlógarøkið.

## Setanartreytir

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við BLF ella annað avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

Kappingarráðið
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi tann 18. november 2007.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Terja Sigurðsson, deildarleiðara, á tlf. 35 60 41 og t-post: terjes@kapping.fo ella Jógvan Thomsen, stjóra, á tlf. 35 60 21 og t-post: jt@kapping.fo.

Skálatrøð 20 · Postboks 73 · FO-110 Tórshavn · Føroyar · Tel + (298) 35 60 40 · Fax + (298) 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo